# Hópin av hentleikum

**Við heimasíðu okkara hava vit tætt samband við kundarnar 24 tímar um samdøgrið hvønn dag í árinum, sigur Jónsvein Simonsen, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, um heimasíðuna hjá tryggingini, ið hevur eina ørgrynni av møguleikum**

TRYGGING

Tá fyritøkur seta sær fyri at satsa upp á eina heimasíðu, er umráðandi at gera tað við fullum huga - ella als ikki.

Tryggingarfelagið Føroyar hevur valt tað fyrra við síni heimasíðu, sum í stóran mun nøktar allan tørv, ein vanligur tryggingartakari kann hava, tá hann umvegis internetið vil hava fatur í tryggingini.

Sum heild eru tað nakrir táttir, ið eru afturvendandi á øllum framkomnum heimasíðum hjá tryggingarfeløgum, og tann hjá Tryggingarfelagnum Føroyar lýkur væl og virðiliga allar hesar tættir.

Tað ber til at rokna prís, bíleggja tilboð, fáa kunning um produktið og útfylla skaðafráboðan til mest vanligu skaðarnar. Harumframt hevur síðan aðra kunning og aðrar hentleikar, ið fáa tað veruliga at loysa seg hjá tryggingartakarum at klikka seg inn á www.trygging.fo.

Allir kundar hava fingið eitt kundanummar og loyniorð frá tryggingini. Við hesum letur internetið beinanvegin upp fyri øllum teim persónligu møguleikunum á heimasíðuni, har ein kann síggja sínar tryggingar og nógv annað.

## Uppliving av øktari tænastu

– Tá vit skuldu leggja heimasíðuna til rættis, settu vit okkum fyri at fáa eina góða og nøktandi síðu, ið livdi upp til tað, ið krevjast kundi av okkum - og eitt sindur aftrat, sigur Jónsvein Simonsen, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Úrslitið er, at vit kunnu brúka internetið sum eitt týðandi amboð í gerandisdegnum. Hetta gagnar samstarvinum millum okkum og kundarnar, ið kunnu fáa eina einfalda, skjóta og greiða viðgerð í hvørjum einstøkum føri.

Tryggingin gjørdi eina marknaðarkanning, ið vísti, at kundarnir ynsktu at fáa fleiri sjálvavgreiðslumøguleikar á internetinum, og út frá hesum var so dentur lagdur á at fáa heimasíðuna funktionella og lætta.

Millum fyrimunirnar er so eisini, at starvsfólkini fáa betri stundir til meira virðisskapandi uppgávur, av tí at minni tíð fer til rutinuuppgávur, ið nú kunnu avgreiðast á heimasíðuni.

– Fyri okkum hevur tað samstundis nógv at siga, at heimasíðan gevur kundunum eina uppliving av øktari tænastu, av tí at vit við heimasíðuni fáa avgreitt nógv mál munandi skjótari, sigur Jónsvein Simonsen.

– Við einari góðari heimasíðu, ið hevur stórt nyttuvirði, fáa vit eisini styrkt um fatanina av okkum sum tryggingarfelagið, ið gevur kundunum ein tryggleika. Og tá vit kunnu borðreiða við einari nýggjari heimasíðu við spennandi møguleikum og hentleikum, styrkir tað eisini um myndina av okkum sum eitt tryggingarfelag, ið appellerar til tey yngru.

Jónsvein sigur, at ætlanin er ikki at steðga her, tí arbeitt verður alla somlu tíðina við at menna og betra heimasíðuna.

– Tað næsta hjá okkum verður at styrkja um tænastuna, tá talan er um tryggingar til vinnulívið og sjólívið, umframt at fólk kunnu síggja kontoavrit á síðuni, sigur hann.

– Alla tíðina eru nýggjar avbjóðingar og nýggjar tænastur, vit kanna gjøllari, so vit framhaldandi kunnu hava eina góða heimasíðu.

## Hava satsað rætt

Royndirnar higartil við bilfíggingini hava víst, at heimasíðan hjá Tryggingarfelagnum Føroyar er sera væl móttikin av bæði bilkundum og bilasølunum, sum vegna kundarnar avgreiða bilfígging, biltrygging og annað um eina leið á www.trygging.fo, tá onkur kemur at keypa bil.

– Bileigarar kunnu fáa avgreitt bilkeyp, bilfígging og trygging samstundis. Bara tað gevur eina skjóta avgreiðslu, ið ger tað lættari at fáa eitt bilkeyp avgreitt, enn tað var frammanundan, sigur Jónsvein Simonsen.

– Hetta er alt grunda á einfaldni, so talan er um einfaldar lánitreytir og bíligastu fígging, umframt einfalda tekning av trygging. Lættari fær tað ikki verið - enntá fyri allar partar.

Eisini bilasølurnar, ið umsita alt hetta úti hjá sær sjálvum, kunnu á lættan hátt bjóða sínum kundum ein samlaðan pakka. Vegna kundan kunnu sølumenninir á bilasølunum um heimasíðuna søkja um bilfígging og tekna trygging.

Jónsvein Simonsen sigur, at Tryggingarfelagið Føroyar eisini hevur fingið góðar afturmeldingar frá sínum kundum, ið eru sera fegnir um nýggju møguleikarnar og styrktu tænastuna við heimasíðuni.

– Og so eru tað eisini okkara egnu starvsfólk, ið eru fegin um teir lættar, heimasíðan hevur skapt í gerandisdegnum. Vit hava sjálvandi satsa við heimasíðuni, men higartil hevur alt peikað á, at vit eisini hava satsað rætt, sigur hann.



*Jónsvein Simonsen, deildarstjóri og Petur Elias Petersen, ið hevur ábyrgdina av bilfíggingini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í nýggju snotuligu hølunum hjá á Kongabrúnni í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

www.trygging.fo



# Alt um eina leið

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur síðstu árini veitt føroyskum bileigarum ta tænastu, at bæði fígging og trygging til bilin kann verða avgreidd í eini handavend á bilasøluni. Hetta verður gjørt umvegis online-telduskipanina hjá tryggingini, so lániskjal og alt er klárt eftir bara tveimum tímum**

TRYGGING/FÍGGING

Síðani nýggja tænastan hjá Tryggingarfelagnum Føroyar fór av bakkastokki, hevur tað verið eitt spæl at keypt sær nýggjan bil - soleiðis at skilja, at eitt bilkeyp kann avgreiðast skjótt og væl, uttan at nýggi bileigarin skal renna frá Peri til Pól at fáa tingini upp á pláss.

Tilsamans hevur tryggingin avtalu við 13 bilasølur, sum allar umvegis online-skipanina hjá Tryggingarfelagnum Føroyar kunnu avgreiða umsóknir um bilfígging og tekna trygging.

Talan er um eina sera einfalda tænastu, ið vendir sær til øll, ið ogna sær ein bil - óansæð um tað snýr seg um ein nýggjan ella brúktan bil.

Harumframt hava vit bíliga biltrygging at bjóða, og tí kann kundin gera øll síni ørindi á einum stað, tá hann keypir bilin, sigur Petur Elias Petersen, ið hevur ábyrgdina av bilfíggingini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar um hendi.

– Óneyðugt er at gera sær onnur ørindi enn at fara á bilasøluna, tí har ber til at fáa øll viðurskiftini avgreidd undir einum. Tú kanst velja tær ein bil og samstundis fáa hann fíggjaðan og tryggjaðan á einum og sama stað.

## Ómaksleys heildarloysn

Henda ómaksleysa heildarloysnin gongur í stuttum út uppá, at kundin fær fíggingina á bilasøluni, skjóta avgreiðslu og einfaldar lánitreytir.

– Tá tú keypir ein bil við okkara fígging, skalt tú geva bilaseljaranum upplýsingar um navn, bústað og føðingardag, sum bilaseljarin so sendir okkum umvegis eina online-telduskipan, greiðir Petur Elias Petersen frá.

– Hetta gongur skjótt fyri seg, tí vanliga avgreiða vit lánið innan tveir tímar. Tað tekur vanliga eitt sindur longri hjá bilasøluni at gera bilin kláran, men tá tú fært hann, er alt liðugt og avgreitt. Her er einki hóvasták.

Við nýggju bilfíggingini ber til hjá bilkeypara at fáa um 75 prosent av kostnaðinum fíggjaðan, og lánsupphæddirnar minka so samsvarandi aldrinum á bilinum.

## Altíð lægstu rentu

Tá Tryggingarfelagið Føroyar fyri skjótt trimum árum síðani fór undir at fíggja bilar, var hetta eitt nýtt virkisøki hjá tryggingini, sum frammanundan hevði fingist við tryggingar, umframt lán til kommunur, heil- og hálvalmennar stovnar, partabrøv, virðisbrøv o.t.

Men royndirnar higartil vísa, at føroyskir bileigarar hava tikið sera væl ímóti hesi bilfíggingini, ið eisini hevur havt ávirkan á aðrar bilfíggingar í landinum.

– Vit løgdu út við einari rentu, sum var 7,25 prosent og væl lægri enn billánsrentan hjá hinum fíggingarstovnunum. Síðani hava teir lækkað sína rentu, umframt at vit aftur hava lækkað okkara, so vit alla tíðina kunnu geva ta bíligastu fíggingina, sigur Petur Elias Petersen.

Í løtuni er rentan 6 prosent um árið, og tað er sama renta fyri øll billánini, óansæð um talan er um nýggjan ella brúktan bil. So øll kunnu njóta sama fyrimun við hesi skipan.